Umhvørvismálaráðið

Dagfesting: 7. mars 2023
Mál nr.: 23/02877
Málsviðgjørt: PB

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 13. juni 1995 og løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. ... *Stk. 2.* Øll dálking av natúruni við pappíri, fløskum, plastikkíløtum, brotum o.ø. er forboðin. *Stk. 3.* Gomul og ónýtilig før skulu høggast upp ella søkkjast á støðum, har tey ikki eru til bága fyri sigling ella fiskiskapi. *Stk. 4.* Bilvrak, ymisk onnur akfør, maskinamboð og partar av teimum, ið ikki verður nýtt meira, mugu ikki kastast burtur á støð, har tey lýta ella eru til skaða ella ampa fyri onnur. *Stk. 5.* Burturkast og brúktir lutir, ið verða lagdir so, at tað gongur ímóti reglunum í stk. 2-4, kunnu beinast burtur. Tann, ið hevur ábyrgdina av, at óruslið er komið har,	**1.** § 1, stk. 2-5, verða strikað.

skal gjalda kostnaðin. Kostnaðurin kann fáast inn við panting hjá tí avvarðandi.	
§ 2. ... *Stk. 2.* Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini: 1) Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum, 2) nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi, 3) nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum. *Stk. 3-8.* ...	**2.** Í § 2, stk. 2, verður "eigur" broytt til: "skal".
§ 2. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Landsstýrið kann aftan á ummæli frá yvirfriðingarnevndini og avvarðandi sóknarstýri í kunngerð fyriseta, at forboðini í stk. 2 ikki skulu galda fyri ávís nágreinilig økir, ið natúrliga hoyra inn undir verandi byggilendir og havnaøkir. *Stk. 4-5.* ... *Stk. 6.* Áðrenn loyvi verður givið sambært stk. 5, skal friðingarnevndin fáa til vega ummæli frá avvarðandi sóknarstýri, og um so er, at søkt verður um loyvi, at víkja frá tí í stk. 2, nr. 2 fyrisetta forboð, tá eisini viðalundarnevndini. *Stk. 7-8.* ...	**3.** Í § 2, stk. 3 og 6, verður "sóknarstýri" broytt til: "kommunustýri".
§ 2. ... *Stk. 2-5.* ... *Stk. 6.* Áðrenn loyvi verður givið sambært stk. 5, skal friðingarnevndin fáa til vega ummæli frá avvarðandi sóknarstýri, og um so er, at søkt verður um loyvi, at víkja frá tí í stk. 2, nr. 2 fyrisetta forboð, tá eisini viðalundarnevndini. *Stk. 7-8.* ...	**4.** Í § 2, stk. 6, verður "viðalundarnevndini" broytt til: "skógfriðingarnevndini".
§ 4. … *Stk. 2.* Vegagerð, setan av el- og telefonsteyrum og onnur arbeiðir, ið kunnu væntast at broyta sermerkt landslag munandi, ella at týna leivdir av sermerktari natúr, mugu ikki verða gjørd ella byrjast uttan loyvi frá natúrfriðingarnevndini. Hendir hetta kortini, kann nevndin nokta	**5.** Í § 4, stk. 2, 1. pkt., verður "sermerkt landslag" broytt til: "sereyðkenni við landslagnum".

fyri, at arbeiðið heldur fram og krevja, at avvarðandi ger alt aftur, sum tað var.	
	6. II. partur verður strikaður.
§ 12. Friðingarnevndin heldur fund, tá ið áheitan kemur frá landsstýrinum, yvirfriðingarnevndinini, Føroya Jarðarráð, einum sóknarstýri ella frá einum eigara ella brúkara, ið ynskir natúrfriðingarmál tikið upp, ella ynskir at fáa eitt av teimum í hesi lóg umrøddu loyvir. Annars kemur nevndin saman, tá ið hon sjálv heldur tað vera neyðugt. *Stk. 2-5.* …	**7.** § 12, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Friðingarnevndin heldur fund, tá ið áheitan kemur frá landsstýrismanninum, yvirfriðingarnevndini, Búnaðarstovuni, einum kommunustýri ella einum eigara ella brúkara, sum vil hava eitt av teimum í hesi løgtingslógini umrøddu loyvunum. Annars kemur nevndin saman, tá ið hon sjálv heldur tað vera neyðugt."
§ 13. ... *Stk. 2.* Sambært stk. 1 er boðsendingin galdandi fyri allar eigarar, brúkarar og aðrar, ið hava rættindir í einum hagaparti, tá ið ein limur í hagastýrinum er boðsendur. Um almenn jørð á føroyskum hondum er partaeigari í haganum, skal Føroya Jarðarráð eisini verða boðsent. *Stk. 3-5.* ...	**8.** Í § 13, stk. 2, verður "Føroya Jarðarráð" broytt til: "Búnaðarstovan".
§ 14. Um málið snýr seg um friðing av lendi, skal, formaðurin stíla fyri at fáa til vega, um neyðugt, týðuliga uppriting. *Stk. 2.* Nevndin kann áleggja eigara ella øðrum einki at gera, ið kann hindra avgerðum nevndarinnar. Slíkar avgerðir kann formaðurin taka í samband við boðsending til fyrsta fund, men skal tá góðtakast av nevndini á sama fundi. *Stk. 3.* Limirnir í nevndini hava óskerdan rætt at koma á tey lendir, ið talan er um at friða. **§ 15.** So framt tað er gjørligt, skal nevndin royna seming við eigararnar og aðrar, ið rættindi eiga friðingini viðvíkjandi, ella virka fyri at fáa í lag einahvørja loysn, ið ikki ber útreiðslur við sær fyri tað almenna. Fæst semja, verður hon skrivað í gerðabókina, um ikki, verður málið avgjørt við úrskurði. *Stk. 2.* Bjóðar eigari saman við øðrum, ið rættindi hava, at áleggja ognini servitut	**9.** §§ 14-15 verða strikaðar.

friðingini viðvíkjandi uttan endurgjald, kann formaðurin viðgera málið einsamallur. *Stk. 3.* Fæst semja eftir stk. 1-2 ger formaðurin tær skipanir, ið neyðugar eru at festa friðingina.	
§ 16. Nevndin ger av við úrskurði, um eitt í sýsluni verandi øki ella ein á staðnum verandi natúrlutur skal verða friðaður, og hvørji tiltøk skulu takast fyri at vísa friðingina, t.d. stik, garð ella aðra avmarkan. *Stk. 2.* Í úrskurði viðvíkjandi byggingi – sambært § 2 – kann ásetast, at bygging av einum húsi ella umbygging ella aftratbygging av verandi bygningi ikki má fara fram, fyrr enn tekningar og ætlanir eru góðkendar av nevndini. *Stk. 3.* Nevndin kann í serligum umstøðum krevja, at lóglig framd bygging, planting ella eitthvørt annað hesum líkt, og sum lýtir, at tað skal takast burtur, tá ið tað ikki kostar alt ov mikið ella ov nógv fer fyri skeytið, sbr. her § 17. *Stk. 4.* Um friðingin ikki kann fara fram, uttan at eigari missir lendi, kann ognartøka fara fram.	**10.** § 16, stk. 1 og 4, verða strikað. Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 1 og 2.
§ 17. Úrskurður, ið ber í sær, at ognartøka, friðing ella onnur samsvarandi skipan skal fremjast, eigur nevndin eisini at avgera, hvørjar fyriskipanir ella atgerðir eigarin ella brúkarin av avvarðandi ogn skal gera, fyri at friðingin kann verða framd og eisini, um eigarin hevur rætt til endurgjald. Hevur hann tað, ásetur nevndin støddina á endurgjaldinum, og hvussu tað skal býtast millum eigarar og aðrar, ið rættindi eiga, og sum hava gjørt krav um endurgjald. **§ 18.** Úrskurður, ið ber í sær, at ognartøka, friðing ella líknandi fyriskipan skal fara fram, verður kunngjørd samsvarandi reglunum í § 13, stk. 1-2. Teir, sum hava verið á fundi undir sakarmálsviðgerini ella hava sent skrivligt ummæli í málinum, og sum ikki eru hjástaddir á fundi, tá ið aðrar avgerðir og úrskurðir verða tiknir, fáa skrivliga frásøgn. *Stk. 2.* Úrrit av úrskurðum og avgerðum og av teimum sáttargerðum, ið gjørdar eru,	**11.** §§ 17-20 verða strikaðar.

skulu áðrenn 14 dagar sendast til landsstýrið, avvarðandi kommunu, hansara, ið reist hevur málið og eftir avgerð formansins til aðrar, sum møguliga hava áhuga fyri avgerðini. *Stk. 3.* Áðrenn somu tíðarfreist sendir formaðurin inn skjølini í málinum saman við úrriti av gerðabókini til yvirfriðingarnevndina. **§ 19.** Nevndarformaðurin ger av, tá ið yvirfriðingarnevndin boðar honum frá, teim neyðugu atgerðum fyri at festa sáttmálan ella tær við úrskurði gjørdu skipanir, her íroknað tinglýsing av úrskrift, gjalding av endurgjaldi og møguliga kunngering um marksetan av økinum. Um eigarar ella aðrir ikki taka stig til tað í úrskurði ella sáttmála áhvílandi atgerðir, letur formaðurin hetta fremja fyri rokning teirra avvarðandi. Hesar útreiðslur kunnu fáast inn aftur við panting. *Stk. 2.* Tá ið ein tinglýstur friðingarservituttur fellur burtur ella fer úr gildi, skal formaðurin skipa fyri avlesing og – um neyðugt – lýsa við kunngerð v.m. **§ 20.** Nevndin kann, tá ið hon er samd ella við úrskurði taka av friðingarreglur, ið ikki longur kunnu haldast at hava nakran týdning. Reglurnar í undanfarnu greinum kunnu eisini við hógv nýtast í slíkum føri.	
§ 21. Avgerðir, sum friðingarnevndirnar taka, kunnu skjótast inn fyri yvirfriðingarnevndina av einum og hvørjum, ið hevur verið á fundi undir viðgerðini av málinum, ella hevur sent inn skrivliga greinagerð, somuleiðis landsstýrið, Føroya Jarðarráð og eitthvørt sóknarstýri, sum hevur áhuga fyri málinum. *Stk. 2-6.* …	**12.** § 21, stk. 1, verður orðað soleiðis: **“**Avgerðir, sum friðingarnevndirnar taka, kunnu skjótast inn fyri yvirfriðingarnevndina av einum og hvørjum, ið hevur verið á fundi undir viðgerðini av málinum ella hevur sent inn skrivliga greinargerð, somuleiðis av landsstýrismanninum, Búnaðarstovuni ella einum kommunustýri, sum hevur áhuga fyri málinum.”
§ 21. ... *Stk. 2-3.* … *Stk. 4.* Um avgerðir, sum nevndin tekur, ella semjur, hon fær í lag, bera í sær endurgjald fyri tað almenna, ið fara upp um 500 kr., kann gótøka ikki verða, fyrr enn landsstýrið	**13.** § 21, stk. 4, verður orðað soleiðis: “*Stk. 4.* Avger yvirfriðingarnevndin sambært stk. 3, at ein av friðingarnevndini gjørd viðtøka ikki kann góðtakast, verður málið at senda aftur til nýggja viðgerð í

hevur tikið undir við avgerðini ella semjingini. *Stk. 5-6.* …	friðingarnevndini, uttan so at yvirfriðingarnevndin heldur, at málið er dottið burtur. Yvirfriðingarnevndin kann eisini gera av, at málið skal viðgerast sum kærumál eftir teimum fylgjandi reglunum.”
§ 21. ... *Stk. 2-4.* … *Stk. 5.* Noktar landsstýrið at taka við, er avgerðin ella semjan, sum nevndin hevur gjørt, dottin burtur. Yvirfriðingarnevndin tekur tá avgerð, um málið skal takast upp aftur til nýggja viðgerð í friðingarnevndini. *Stk. 6.* Avger yvirfriðingarnevndin sambært stk. 3, at ein av friðingarnevndini gjørd semja ikki kann góðtakast, verður málið at senda aftur til nýggja viðgerð í friðingarnevndini uttan so, at yvirfriðingarnevndin heldur at málið er dottið burtur. Sama er galdandi, um yvirfriðingarnevndin ger av, at ein av friðingarnevndini gjørd viðtøka ikki kann góðtakast. Yvirfriðingarnevndin kann kortini í slíkum føri eisini gera av, at málið skal viðgerast sum kærumál eftir teim fylgjandi reglunum.	**14.** § 21, stk. 5-6, verða strikað.
§ 26. Endurgjaldingar eftir hesi lóg og útreiðslurnar til virki hjá friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini verða goldnar úr landskassanum.	**15.** § 26 verður orðað soleiðis: “Útreiðslurnar til virkið hjá friðingarnevndunum og yvirfriðingarnevndini verða goldnar úr landskassanum.”